– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Hvussu nógv pláss vilt tú hava?

**Her eru møguleikar fyri at liva, virka og trívast, og her kanst tú breiða teg út uttan ampa fyri nakran. Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snotilig - sterkt og væl bygd.**









### Fyrsta fatanin
Tú sært við tað sama, at her er talan um eini stór og stásilig hús. Húsini eru væl bygd og løtt at halda. Alt er sera væl hildið, og tú fært eina fatan av, at talan er um eini vala hús.

### Ljós og luft
Húsini standa væl og frítt fyri í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi og hava frálíkt útsýni yvir býin og Nólsoyarfjørð. Tú kennir teg ongantíð innibyrgdan, tí vindeyguni eru stór, og tað kemur sera nógv ljós inn.

### Havastova
Út frá miðhæddini er stór terassa. Haðani fert tú inn í eina hugnaliga havastovu við dupultum hurðum móti vesturskininum. Havastovan er væl egnað til grill og hugna.

### Stílur og snið
Stílurin er léttur og ljósur. Húsini eru ikki nýggj, men alt er sera væl hildið og í góðum standi. Húsini eru dagførd og viðlíkahildin so við og við, og tær nýtist einki at gera.

### Bilhús
Tú kanst koyra beinleiðis inn í eitt sera breitt og væl hildið bilhús. Úr bilhúsinum er beinleiðis inngongd inn í snotiligt kjallararúm/vaskirúm við flísum á gólvinum, og haðani eru trappur upp til miðhæddina.

### Uttanfyri og uttanum
Urtagarðurin er hugnaligur og væl røktur. Har er veðurgott og góður sólargangur, so tað er lagað manni at sita uttanfyri og njóta lívið. Har er vakurt og friðarligt, og tú ert so at siga mitt í býnum.

### Innrætting
Í miðhæddini er hjallur, inngongd, durur, gestawc, gong, køkur/alrúm, stova og tvey kømur. Hurð út á altan / terassu og havastova. Í neðra er inngongd, bilhús, hurð til kjallara/vaskirúm, gong, trappa upp til miðhædd, hjúnarrúm, baðirúm við brúsu, fýrrúm og tvey kømur.

### Fakta
**Adressa** .......... Fjalsgøta 2, Tórshavn
**Byggiár:** .......... 1982
**Hæddir:**............ 2
**Gólvvídd:**.......... 240 $m^2$
**Grundøki:**......... 502 $m^2$
**Hjallur:** ............ ja
**Bilhús:**.............. ja
**Havastova:**...... ja
**Prísuppskot:** ... kr. 2.950.000,-









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**